KÍF-VÍF 26-31 (13-16):

# VÍF vann Norðstreym

**VÍF tryggjaði sær sessin í Norðstreymi í hálvfinaluni, tá teir hóskvøldið vunnu ein hampuliga javnan dyst á kollfirðingum**

COCA-COLA KAPPINGIN – MENN
*Jákup Mørk*

Vestmenningar og kollfirðingar skudu hóskvøldið finna útav, hvar av teimum skuldi vinna seg fram í hálvfinaluna í steypakappingini.

Úrslitið gjørdist, at VÍF vann, men sigurin var ikki av tí lætta slagnum. Alla tíðina høvdu kollfirðingar sera stutt tjóður í oddaliðnum, og eitt nú var bert hitt eina máli á muni, tá fýra minuttir vóru eftir at spæla.

Tá eydnaðist tað tó loksins vestmenningum at skræða seg leysar, og við sigrinum er VÍF altso komið í hálvfinaluna.

### Dysturin í tølum

**KÍF-VÍF 26-31 (13-16)**
Málskjúttar:
KÍF: Vagnur Johannesen 5, Regin Petersen 5, Durica Tomic 4(2), Iljan Topic 4, Kristian Madsen 4, Jákpu Dam 2(1), Petur Martin Poulsen 2
VÍF: Sámal Joensen 8, (3), Johnny Joensen 4, Daniel Rápa 4, Áki Olsen 3, Harald Bjørgvin 3, Ragnar Zachariasen 3, Ingi Olsen 3, Rógvi Nielsen 2, Petur Fr. Joensen 1
Brotskøst: KÍF 3, VÍF 3
Útvísingar: KÍF 3
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum

## Hondbóltsstøður

### 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 10 | 10- 0 - 0 | 287 | 177 | 110 | 20 |
| 2 | Stjørnan | 10 | 8 - 0 - 2 | 273 | 211 | 62 | 16 |
| 3 | Neistin | 10 | 7 - 0 - 3 | 219 | 187 | 32 | 14 |
| 4 | VB | 10 | 5 - 0 - 5 | 243 | 251 | -8 | 10 |
| 5 | Kyndil | 12 | 3 - 0 - 9 | 271 | 310 | -39 | 6 |
| 6 | Sóljan | 10 | 2 - 0 - 8 | 197 | 277 | -80 | 4 |
| 7 | StÍF | 10 | 1 - 0 - 9 | 180 | 257 | -77 | 2 |

### 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 10 | 9 - 1 - 0 | 292 | 230 | 62 | 19 |
| 2 | Neistin | 10 | 8 - 2 - 0 | 307 | 261 | 46 | 18 |
| 3 | H71 | 11 | 5 - 1 - 5 | 299 | 304 | -5 | 11 |
| 4 | StÍF | 10 | 3 - 1 - 6 | 270 | 271 | -1 | 7 |
| 5 | KÍF | 10 | 3 - 1 - 6 | 257 | 278 | -21 | 7 |
| 6 | Tjaldur | 10 | 2 - 2 - 6 | 241 | 277 | -36 | 6 |
| 7 | Kyndil | 11 | 2 - 0 - 9 | 250 | 295 | -45 | 4 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v | - | t | v sett | v sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 7 | 6 | - | 1 | 19 | 6 | 13 | 12 |
| 2 | Mjølnir | 7 | 4 | - | 3 | 15 | 13 | 2 | 8 |
| 3 | Dráttur | 7 | 4 | - | 3 | 15 | 13 | 2 | 8 |
| 4 | ÍF | 7 | 2 | - | 5 | 13 | 17 | -4 | 4 |
| 5 | Fleyr | 6 | 1 | - | 5 | 4 | 17 | -13 | 2 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v | - | t | v sett | v sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fram | 7 | 6 | - | 1 | 19 | 10 | 9 | 12 |
| 2 | SÍ | 7 | 5 | - | 2 | 17 | 9 | 8 | 10 |
| 3 | Fleyr | 7 | 4 | - | 3 | 15 | 13 | 2 | 8 |
| 4 | Mjølnir | 7 | 3 | - | 4 | 14 | 15 | -1 | 6 |
| 5 | ÍF | 8 | 0 | - | 8 | 6 | 24 | -18 | 0 |

# Oddurin dregur

**Tey bæði oddaliðini, VÍF og Stjørnan, kunnu draga enn meira frá hinum um vikuskiftið, tá tey spæla móti liðunum, sum eru á triðja og fjórða plássinum**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*



*Neistin var seinasta liðið, sum vann á VÍF, men tað tykist lítið sannlíkt, at tær skulu endurtaka hetta sunnudagin*

Eftir kappingarskipanini skuldu tríggir kvinnudystir verða leiktir hetta vikuskiftið, men orsakað av framskundaða dystinum millum Kyndil og VB er talan tó bert um tveir.

Fyrri av hesum fer í gongd klokkan hálvgum tvey sunnudagin, tá VB á heimavølli tekur ímóti Stjørnuni.

Einki er at siga til, at talan var um eitt stórt vónbrot hjá VB, tá tær fyri viku síðani fingu av at vita frá Kyndli. Liðið ætlaði sær so avgjørt ein leiklut í oddinum í ár men eftir stórtapið fyri júst Stjørnuni, hevur tað bert gingið niðureftir.

VB hevur tí nakað at hevna, og spurningurin er so, hvørt hetta letur seg gera móti Stjørnuni. Klaksvíkskvinnurnar hava skúgvað alt uttan VÍF til síðis í ár, men í steypadystinum týskvøldið sást tó, at tær á ongan hátt eru ógjørligar at tosa við, og so er spurningurin, hvussu VB fer at megna hesa uppgávuna.

Seinni dysturin verður í Vestmanna, har VÍF tekur ímóti Neistanum. Neistin er í løtuni á triðja plássinum, og sjálvandi hava tær einki ímóti at styrkja um hesa støðu, men tað verður tó meira enn trupult í Vestmanna.

Her hevur heimaliðið vunnið alt, sum kann vinnast, nú í hálvt annað ár, og tað er illa hugsandi, at Neistin fær gjørt nakað við hesa gongd. Annars var Neistin seinasta liðið, sum vann á VÍF, tá tær í seinasta umfarinum á vári í 2000 tóku silvurmerkini í Vestmanna, men tað er tó stórur munur á VÍF tá og nú.

# Grundspælið skal avgerast

**Talan verður um rættan oddadyst í Vestmanna sunnudagin, tá tey bæði ósigraðu oddaliðini bresta saman í dystinum, sum helst avger grundspælið**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*



*Javnleikur var úrslitið, tá Neistin og VÍF dystaðust í Havn, og í øllum førum tykist dytsurin sunnudagin at gerast bæði javnur og spennandi*

Tríggir dystir verða í bestu mansdeildini hetta vikuskiftið. Tveir teirra hava týdning fyri, hvussu raðfylgjan verður niðarliga á stigatalvuni, men einki er at ivast í, hvør stóri dysturin er.

### Stórdystur

Tað verður størsti dysturin á árinum higartil, tá Neistin sunnudagin fer til Vestmanna. Alt kappingarárið hava Neistin og VÍF verið mest sum jøvn í oddinum, tó at Neistin misti eitt stig á Skála, har VÍF vann við einum einsamøllum máli.

Í fyrra dystinum millum liðini bæði varð eisini staðfest, hvussu jøvn hesi bæði liðini í veruleikanum eru. Tá endaði alt við javnleiki, og hóast javnleikur ikki kann roknast fyri eitt sannlíkt úrslit, so er einki at ivast í, at talan aftur verður um ein javnan og spennandi dyst.

Stóri spurningurin er so, hvussu liðini eru fyri í mun til fyrra dystin teirra millum. Verður hugt at fólkinum, so er lítið at ivast í, at Neistin hevur størra fyrimunin, so hvørt sum árið líður, við tað at teir gerast alt meira samanspældir, og eitt nú hevur John Petersen veruliga gjørt um seg seinastu dystirnar.

Hinvegin var VÍF í fyrra dystinum uttan teir báðar skjúttarnar, Áka Olsen og Piddi Negru. Piddi fær helst ikki verið við fyrr enn eftir nýggjár, men Áki er nú við aftur, og ivaleyst kann hetta geva vestmenningunum ein eyka trumf. Tað skal í øllum førum ein sterk verja til, um hann skal halda báðum Olsen-beiggjunum umframt Sámali Joensen frá at skjota.

Í báðum legunum er spenningurin sum vera man stórur, og tí er einki at ivast í, at talan verður um eina stúgvandi fulla ítróttarhøll í Vestmanna sunnudagin.

### Botnstríðið

Annars verður eisini dystur í Vestmanna leygardagin. Tá fara KÍF og Tjaldur at dystast um, hvør teirra skal vera longur burtur frá botninum í vetrarsteðginum.

Hjá báðum liðum hevur talan verið um stóra framgongd síðani kappingarársbyrjan, og ikki minst tykjast kollfirðingar at vera væl fyri í løtuni, tó at teir taptu fyri VÍF í steypakappingini mikukvøldið. Tjaldur hevur kanska eisini havt teir torføraru dystirnar í seinastuni, men óhugsandi er tað á ongan hátt, at teir fara at gera enn ein vørr leygardagin.

Seinasti dysturin um vikuskiftið verður á Skála, har StÍF tekur ímóti Kyndli. Hetta er sum so dysturin millum tvey lið, sum hvør í sínum lag eru vónbrotin um úrslitini higartil. Kyndil er í teirri óvandu støðu, at teir eru niðast á stigatalvuni, og tó at StÍF hevur staðið seg sera væl móti oddinum, so hava teir bert vunnið tríggjar dystir í ár, og hetta bendir so avgjørt ikki á nakran stabilitet.

Tí ræður um at vinna hjá báðum liðum, og tó at heimaliðið helst er greiður favorittur, so kann einki útilokast frammanundan, tá StÍF er annar parturin.

Vikuskifti

Nr. 243 • leygardagur • 15. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Ongantíð sæð kava áður

– Her er ógvuliga kalt, so eg havi tikið nógv heit klæðir við, sigur 18 ára gamla Hor Yee Lam úr Hong Kong, ið gongur á Studentaskúlanum á Kambsdali



Lesið á síðu 3



*- Eg havi ikki hugsað so nógv um Annu Frank áðrenn eg vitjaði húsið, har hon búði. Tað var veruliga hugtakandi, sigur Frida Johannessen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Anna Frank ímyndin av tí góða

- Eg eri errin av at vera tann, sum týddi Dagbók Onnu Frank til føroyskt. Anna Frank var ein stuttlig genta, dugdi ógvuliga væl at skriva og hevði ein dreym um at verða rithøvundur, sigur Frida Johannessen, sum hevur týtt bókina úr hollendskum

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Í gjár kom út á fyrsta sinni føroysk týðing av Dagbók Onnu Frank. Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út. Tað er 22 ára gamla Frida Johannessen úr Havn, sum hevur týtt bókina úr upprunamálinum hollendskum. Frida hevur seinastu tvey árini búð í Hollandi saman við manni sínum, sum er úr Belgia. Tey búgva í Amsterdam, har hon lesur løgfrøði. Tíðliga í summar fingu tey ein son.

Tað eru tvey ár síðani, at Frida vendi sær til Bókadeildina við fyrispurningi, um tey vóru áhugað í at fáa Dagbók Onnu Frank týdda til føroyskt. Forlagið tók væl undir, og Frida fór undir at týða á vári í fjør.

- Týðingararbeiðið gekk seint í byrjanini, tí eg gekk í skúla samstundis og stutt síðani hevði lært málið. Tað tók tí meiri enn eitt ár at týða fyrra helmingin í bókini, men eftir, at eg átti í summar, havi eg havt stundir til at týða bókina lidna, greiður Frida frá.

Frida hevur lært hollendskt á málskúla í Belgia fyri góðum tveimum árum síðani.

- Eg havi altíð havt áhuga fyri máli, so tað gekk lætt og skjótt at læra. Eg kendi meg skjótt nóg stinna til, at eg kundi bjóða meg fram at týða. Hollendskt minnir nógv um danskt, mállæran er einføld og løtt, og nógv orð kenna vit út øðrum málum. Fólk halda, at málið er ringt, tí tað ljóðar so løgið, sigur Frida, sum tosar hollendskt raðið.

### Stuttlig genta

Ein vitjan í húsunum, har Anna Frank búði, var byrjanin.

- Eg havi ikki hugsað so nógv um Annu Frank áðrenn eg vitjaði húsið, har hon búði. Og eg hevði ikki lisið dagbókina hjá henni. At síggja alt hugtók meg ógvuliga nógv. Tað var løgið at ímynda sær, at tey høvdu krógvað seg í hesum húsunum. Alt var, sum tað var tá. Skrivað var á veggin, hvussu nógv Anna og systurin vuksu og ymiskar dagfestingar. Við síðuna av húsunum er nú eitt savn bygt uppí sum lýsir nasismuna og hennara gerningar, greiðir Frida frá.

Dagbók Onnu Frank er sum kunnugt skrivað av Onnu Frank í tíðarskeiðnum 12. juni 1942 til 1. august 1944. Anna Frank var jødi, fødd 15. juni í 1929 og var sostatt 13 ára gomul, tá ið dagbókin byrjar. Anna Frank, systurin og foreldur teirra krógvaðu seg fyri nasistunum í einum húsum saman við einum øðrum húski, sum átti ein son, ið var javngamal við Onnu. Anna Frank doyði á vetri í 1944.

- Anna Frank var ein stuttlig genta, dugdi ógvuliga væl at skriva og hevði ein dreym um at verða rithøvundur. Málið og skrivingarlagið í bókini er lætt, ikki barnsligt, men heldur ikki høgtflúgvandi. Sjálvt um bókin er skrivað undir seinna heimsbardaga og undir serligum umstøðum, snýr hon seg ikki um kríggj. Lesarin fær tó eina fatan av krígnum í bókini, men hon er fyrst og fremst um onnur viðurskifti, sum ungar gentur eru upptiknar av. Bókin er tí serliga væl egnað til ung. Anna Frank lýsir trupulleikarnar, sum eru millum hana og foreldrini, um kærleika og kynsliga búning. Viðhvørt er hon ógvuliga tung í huga, kanska tí hon var so nógv einsamøll.

At bókin er dagbók og skrivað av ungari gentu, gjørdi, at Frida Johannessen setti seg føra fyri at týða hana.

- Eg eri errin av at vera tann, sum týddi hana. Vóni, at fólk taka væl undir við henni. Eg havi roynt at týtt bókina til gerandisføroyskt, sum mítt ættarlið av føroyingum skilur, sigur Frida Johannessen, sum tó ikki hevur ætlanir um at týða aðrar hollendskar bókmentir.

Fyrstu útgávurnar av Dagbók Onnu Frank, sum komu út fyrst í fimmtiárunum, vóru nógv skerdar í mun til upprunahandritið. Tað var pápi Onnu Frank, sum valdi at taka partar úr bókini úr. Partar, ið snúðu seg um tað kynsliga, sum ikki var vanligt at lesa tá, skrivað av ungari gentu. Seinni eru hesir partar lagdir afturat útgávunum, og nú fyri stuttum eru nýggj brot í dagbókini funnin. Øll dagbókin í sínum upprunalíki er týdd til føroyskt.

- Í Hollandi hevur seinni heimsbardagi framvegis nógv at siga, tí tey høvdu kríggið so tætt uppá. Frælsisdagurin verður framvegis hátíðarhildin. Anna Frank er ímyndin av tí góða sum var hóast kríggj.

Dagbók Onnu Frank er ein tann mest umtalaða bókin eftir seinna heimsbardaga. Spurnartekin hava verið sett við, um hon er ektað, men serfrøðingar eru komnir eftir, at hon er veruliga Dagbók Onnu Frank.




*Brot úr dagbókini, har Anna Frank sipar til dagbókina:* “Eg vóni at eg fari at kunna siga tær alt, soleiðis sum eg ongantíð fyrr havi kunnað sagt nøkrum. Eg vóni, at tú fert at kunna at verða mær ein góður stuðul. Anna Frank 12. juni 1942”.

- Dagbókin er ein klassikari og veruliga fangandi, sigur Frida Johannessen at enda í viðtali.